## Contador í serflokki

Í hesum døgum verður súkklað kring Spania í stóru Vuelta a Espana, og í løtuni tykist eingin kunna gera nakað við Alberto Contador. Leygardagin skræddi hann feltið sundur á sonevndu kontaetapuni upp eftir Alto de L'Angliru, og í gjár vann hann eisini 14. etapuna. Tað er á fjallastrekkjunum, at stóru súkklukappingarnar vanliga verða avgjørdar, og sum Contador hevur súkklað hesar seinastu dagarnar, bendir alt á, at tað verður hann, sum kann koyra í gulum seinastu dagarnar.




## Messi ov sjálvsøkin

Diego Armando Maradona finnur framvegis vegin til yvirskriftirnar, tá um fótbóltsviðurskifti ræður. Legendariski 10'arin hjá Argentina finast nú at Lionel Messi, tí hesin skal vera ov sjálvsøkin. – Við hvørt spælir Messi bara fyri Messi. Hann heldur seg vera meira enn liðið. Tók hann Aguero ella Riquelme meira við í spælið, hevði hetta heilt víst bøtt um úrtøkuna, sigur Maradona um argentinska spælið, sum higar til bert hevur givið 13 stig í 8 undankappingardystum. Sjálvur sigur Messi tó, at hann er somikið vanur við, at Maradona hevur sína fatan av spælinum, at hetta als ikki fær hann at broyta spælistíl.

## 07 Vestur snávaði

**TB basti 07 Vestur, sum við hesum misti týðandi stig í oddastríðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir bara eitt vikuskiftið niðan fyri strikuna er AB nú aftur á uppflytarakós.

Argjamenn greiddu sjálvir sín setning, tá teir vunnu tryggan sigur á Víkingi, og so var frøin á Argjum stór, tá boðini um TB-sigurin móti 07 Vestur bórust. Hetta bar nevnliga við sær, at AB nú aftur er framman fyri 07 Vestur, sum annars vann trygt á júst AB fyri viku síðani.

Og eisini í botninum er nú um at gerast heilt spennandi. Tað eydnaðist nevnliga bæði KÍ og EB/Streymi at vinna sínar dystir um vikuskiftið. Hjá EB/Streymi er talan framvegis um, at teir hava knívin heilt nær barkanum, men KÍ kann nú við einum einstøkum sigri lyfta seg upp um niðurflytingarstrikuna.

Seinasti dysturin var á Svangaskarði, har VB/Sumba var á vitjan. VB/Sumba hevur stóran part av árinum verið á uppflytingarkós, men kring summarsteðgin stóð heilt nógv á nøkur á. Nú tykist glið tó aftur vera komið á, og við sigrinum halda teir fast um oddasessin í deildini.

**Úrslitini um vikuskiftið**

| | |
|---|---|
| B68-VB/S | 2-4 |
| TB-07 Vestur | 2-1 |
| KÍ-NSÍ | 4-1 |
| AB-Víkingur | 6-2 |
| EB/S-HB | 3-1 |

# Mistøkini vórðu revsað



*Dianne Møller skal í ár styrkja bakketuna hjá Stjørnuni. Ímóti Slovan Duslo Sala mátti hon tó partvísti virka sum vikarur á strikuni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í løtum var Stjørnan væl við móti makedonska Slovan Duslo Sala, men óansni í fáar minuttir verður náðileyst revsað á hesum støðinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Samlaði sigurin hjá makedonsku meistarunum gjørdist 55-43, men hóast hetta í sjálvum sær er rættiliga sannførandi, so var munurin kanska ikki so stórur á liðunum kortini.

Dystirnir prógvaðu í øllum førum, at spælir Stjørnan upp til sítt besta, so kunnu tær væl vera við á hesum støðinum.

Trupulleikin var kanska heldur, at Stjørnan í heimligu kappingini hevur verið undir ov lítlum trýsti. Tá hava tær ráð til, at konsentratiónin í spælinum fer nakað niður av og á, men hetta sluppu tær ikki ókeypis frá móti Duslo Salo.

Í báðum dystunum var gongdin nevnliga tann, at Stjørnan hevði sera gott tak á mótstøðuni í longum løtum. Men í løtum varð hetta taki eisini slept, og so fall hamarin hart. Knallhart.

Tað bøtti heldur ikki um hjá Stjørnuni, at liðið til týdningarmiklu dystirnar mátti vera bæði Unu Olsen og Joan Midjord Djordjevic fyriuttan. Hóast eingin spælari vinnur nakað sum helst einsamøll, so er talan um tvær av teimum mest týðandi hjá Stjørnuni. Hartil merkti hetta eisini, at fólk varð flutt frá bakkunum til ávikavist miðjuna og strikuna, og tað skapar somuleiðis órógv.

Samanumtikið var talan tó um tvey avrik, sum væl og virðiliga kunnu góðkennast, og hjá Stjørnunum er einki at ivast í, at dystirnir og øll venjingin, sum liggur handan hesar, er góð barlast, nú tær enn eina ferð skulu geras seg út til at verja FM-heitið.

EB/Streymur-ÍF:

# Oddasessurin kann styrkjast

**Aftur hesa ferð snávaðu biðlarnir í silvurstríðnum, og í kvøld kann EB/Streymur taka enn eitt fet móti gullinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sigfríður Clementsen, Magni Mohr og teirra menn mundu neyvan vera heilt ónøgdir um úrslitini, sum vóru í Formula-deildini í gjár.

Hóast gullið skjótt tykist vera ein avgreiðsluspurningur hjá EB/Streymur, so vaks trýstið á liðið ikki í gjár, og í kvøld kann EB/Streymur so taka enn eitt fet móti gullinum.

Hesa ferð er tað ÍF, sum kemur á vitjan, og á pappírinum eigur hetta at vera ein dystur, har EB/Streymur tekur stigini. Hóast ÍF í løtum hevur tikið fólk á bóli í ár, so hevur gongdin seinastu vikurnar verið alt annað enn nøktandi. Og við einum arbeiðsskaða til Alexander Jovevic tykist liðið hava mist eitt av sterkastu kortunum tað, sum eftir er av kappingarárinum.

Hjá EB/Streymi var sera stórur partur av hópinum burturstaddur í landsliðsørindum í seinastu viku, og tí er einki at ivast í, at eyka frídagurin í gjár kemur væl við. So er spurningurin bara, um hetta eisini sæst aftur í spælinum, tá liðini fara á vøllin við Margáir kl. 17.30.